Tíðindaskriv frá Bókadeild Føroya Lærarafelags:

3 nýggjar barnabøkur

***Um flugur og fílar**, ið Ingrid og Dieter Schubert hava gjørt. Niels J. Thomsen týddi úr enskum*

***Siggi Jønsson**. Mecka Lind skrivaði, og Sonja Schneider týddi úr svenskum*

***Hugo**. Hetta er triðja og seinasta bókin í røðini, sum Maria Gripe hevur skrivað. Turið Sigurðardóttir týddi úr svenskum*

Ingrid & Dieter Schubert

Um flugur og fílar
Umhvørvislæra fyri tey smáu

Hetta er ein stór og vøkur myndabók, ið sigur frá ymiskum um nógv ólík dýr. Vit hoyra um smá skordýr, dýr, ið liva í vatni, dýr, sum liva í kulda og kava um Norðpólin og Suðurpólin, og stór og smá frumskógardýr. Eisini verður greitt frá umhvørvinum, har dýrini liva, og um, hvussu dýrini hylja seg í sínum umhvørvi.

Tá ið vit hava lisið hesa bókina, hava vit fingið eina hóming av, hvussu fjølbroyttur og undrunarverdur dýraheimurin er.

Fyrst og fremst eru tað myndirnar, ið tala. Tær eru stórar og vakrar, og vit kunnu hava gleði av at hyggja at teimum aftur og aftur. Teksturin er stuttur og knappur, so tann, ið lesur fyri hamnum fær lagt afturat, sum henni ella honum lystir.

Prentgerðini stóð E. O. Prent Tórshavn fyri. Bókin er 34 síður og kostar 95 kr.

Mecka Lind

Siggi Jønsson

Bókin er um smádrongin Sigga, ið gongur í øðrum flokki.

Siggi vildi so fegin átt ein pápa ella eitt systkin – ella í minsta lagi eitt dýr! Men tá ið hann einki eigur av hesum, verður hann noyddur at fantasera. Og Siggi er heimsmeistari í at fantasera.

Mamma hansara og vinirnir og allarmest nýggi lærarin eru ikki altíð so fegin um hansara *»nærstan-sannleikar«*. Tey hava hug at ilskast inn á Sigga, og tá ið hann onkuntíð ger sær ómak at siga satt, so trúgva tey honum ikki.

Men hvussu er vorðið við nýggja læraranum? Sigur hann altíð sannleikan? Okkurt løgið er við honum, og Siggi ger av, at hann skal lúra eftir honum, so hann kann avdúka hann.

Bókin um Sigga Jønsson er ein spennandi og stuttlig bók, ið lýsir ein ógvuliga kensluborinan smádrong.

Framhald av bókini, **Siggi Jønsson og hin Andrea** kemur út í heyst.

Umbrotið og stadið fyri reproarbeiði hevur Hestprent. Prentað hevur Estra. Helgi Justinussen hevur bundið inn. Bókin er 154 síður og kostar 110 kr.

Maria Gripe

Hugo

Bókin um Hugo er tann seinasta bókin í kendu triologini, sum Maria Gripe hevur skrivað. Í teimum báðum fyrstu bókunum hava vit hitt ta kensluborna og ræddu smágentuna Josefinu, ið er so heppin at hitta tann trygga og sjálvstøðuga Hugo.

Í hesi bókini læra vit Hugo betur at kenna. Vit hoyra um skúlagongdina hjá honum, ið eftir hansara áskoðan hvørki er so neyðug ella væl løgd til rættis.

Hugo og Josefina eru bestu vinir, og tá ið Josefina hevur ein vin fyri neyðini, er Hugo altíð fúsur. Ein dagin kemur ein nýggj genta í flokkin. Gentan eitur Miriam.

Miriam og mamma hennara eru fluttar til ommuna at búgva eina tíð. Pápi Miriam hevur verið fyri einum óhappi, og er deyður.

Eingin av børnunum skilir støðuna hjá Miriam. Eingin uttan Hugo.

Josefina roynir at skilja hana, men øvundsjúkan nívir hana, tí hon heldur, at Hugo dámar at vera saman við Miriam, og hon er bangin fyri at missa einasta sanna vin sín, Hugo.

Sett, umbrotið, prentað og heft hevur Einars Prent Tórshavn. Bókin er 154 síður og kostar 98 kr.

JÓLAGÁVA SCHLÜTERS TIL FØROYAR 1992

Til A.P. Møller, Den Danske Bank

*Harhoff varði doktararitgerð um heimastýrið í Føroyum og Grønlandi og segði, at mangan hevði hann undrast á, hvat ið fór fram **dagin undan Lítla Jólaaftan 1992 í forsætismálaráðnum**, tá ið tríggir eftir einum korteri avgjørdu beinanvegin at lata føroyingum havbotnin uttanum Føroyar.*

Mansaldur kravdu føroyingar danska viðurkenning av sjálvsagda ognarrættinum uttan annað úrslit enn støðugt afturvendandi danskt nei. Anker Jørgensen forsætismálaráðharri, segði allan havbotnin uttanum Danmark og Føroyar vera ríkisogn.

„Har var einki at rafla um. Vóru føroyingar ikki nøgdir kundu teir fara sín egna veg."

Eftir einum korteri broyttist hetta heilt óvæntað, knappliga. Í bráðskundi framdu teir Schluter, forsætismálaráðharri, Uffe Ellemann Jensen, uttanríkisráðharri og Atli Dam, løgmaður hetta.

Beinanvegin **23.12.92 Lítla jólaaftan** í kavaroksstormi fór Schluter til Føroyar at bera boðini sjálvt um jólini stóðu fyri durum.

Harhoff og aðrir við honum spyrja hvat var atvoldin til stuttfundin, óvæntaðu avgerðina og henda stóra skund?

BRÜSSELSTÍÐINDI ELVDU TIL HASTVERKIÐ

Føroyar standa uttanfyri ES, men havbotnurin var ikki viðurkendur sum serskilt føroyskt øki tá, hoyrdu enn til ríkið sum so, lá tí undir avgerðum, direktivum galdandi fyri ES, sum komu úr Brussel. 1962 fekk A.P. Møller einkarrætt til kannan og nýtslu av mineralum og kolbrintum á Norðsjóvar botninum.

Tá avgjørdi danska stjórnin einsamøll hvør ið kundi fáa henda rætt eisini á havbotninum uttanum Føroyar, soleiðis hann ikki var serskilt føroyskt øki.

KUNNLEIKI KOM TIL STJÓRNINA:

„Kommissionen fremlagde på rådsmøde (energiministre) **den 21. mai 1992** forslag til direktiv om betingelser for tildeling og udnyttelse af tilladelser til forundersøgelse, efterforskning og udvindelse af kulbrinter."

ÚRDRÁTTUR ÁR:

„Notat om EF-kommissionens forslag til kommissionsdirektiv. (KOM (92) 110).

En belysning af direktivudkastet efter rådsmødet d. 25/6-1993. Notatet er udarbejdet af en arbejdsgruppe bestående af: Kontorchef Carsten Pedersen, energiministeriet (formand), Fuldmægtig Helle M. Hindsholm, energiministeriet (sekretær), Kommitteret Michael Elmer, justitsministeriet, Fuldmægtig Finn Erskov, udenrigsministeriet, efter drøftelse med **de direkte berørte selskaber: DANOP, DENERCO, DONG** samt **MÆRSK OLIE OG GAS A/S:**

„Forslaget er begrundet i Traktatens bestemmelser om gennemførelse af det indre energimarked, om etableringsret og om den frie udveksling af tjenesteydelser og sigter mod fastlæggelse af fælles regler for tildeling af koncessioner m.v."

ÚRSLITIÐ AV ØLLUM RÁÐLEGGINGUM Í BRÜSSEL:

„Europa-parlamentets og rådsdirektiv 94/22/EF af 30. maj 1994 om betingelser for tildeling og udnyttelse af tilladelser til prospektering, efterforskning og produktion af kulbrinter."

DIREKTIVIÐ SIGUR MILLUM ANNAÐ:

„Det indre marked indebærer et område uden indre grænser med fri bevægelighed for varer, personer, tjenesteydelser og kapital."

„Fællesskabet er i vidt omfang afhængig af import for såvidt angår forsyningen med kulbrinter.

Prospektering, efterforskning og produktion af resourcerne i Fællesmarkedet bør derfor fremmes på den bedst mulige måde."

„Forslag til Rådets direktiv om betingelser for tildeling og udnyttelse af tildeling og udnyttelse af tilladelser til prospektering, efterforskning, og produktion:

Der bør vedtages foranstaltninger med henblik på gradvis gennemførelse af det indre marked i løbet af en periode, **som udløber 31. decemb. 1992.** Det indre marked indebærer **et område uden indre grænser** med fri bevægelighed for varer, personer, tjenesteydelser og kapital."

31.12.92 er avgerandi dato fyri donsku stjórnina um hon vil halda havbotnin undir Føroyum uttanfyri markleysa marknaðarøkið so nýggja direktivið ikki skal galda fyri táverandi danska ríkisins havbotn uttanum Føroyar.

Hvør ið gjørdi stjórnina vara við, at nú hastaði, kann gitast um, men at tað var úr uttanríkismálaráðið er greitt.

Tann sum vildi hava størstan fyrimun av at fáa danska havbotnin undir Føroyum uttanfyri ES myndugleika við at gera hann føroyskan var uttan nakran iva A.P. Møller og Den Danske Bank.

Í kavaroki má Schluter beinanvegin loftleiðis til Føroyar við jólagávuni áðrenn ov seint var **áðrenn 31.12.92.**

Har var einki at rafla um.

Søkjandi, kannandi, dypdarborandi, spyrjandi, kritisk metandi journalistar á Sosialinum og Dimmalætting siga embætismaður í danska uttanríkisráðið, sum skal ráðgeva í spurningum, sum nema við Føroyar, segði tvætl um ávísan og metan av hvat ið fór fram, sum noyddi Schluter at fara í gekkaskort sum jólamaður til Føroyar ella var tað í veruleikanum A.P. Møller, sum Grýlan á Gørðum? tá danski forsætismálaráðharrin fór at kalla við eldi í holinum at bera føroyingum 1992 jólagávuna.

Fleiri eru nú sum halda at A.P. Møller og Den Danske Bank gjørdi kvettið, meðan føroyingar sum vant fingu royk og onga grind úr Danmark.

Karl Nolsøe
1. mai 1996